## GÍ/LÍF skal hava nýtt navn

Nevndin í nýggja samanlagda felagnum GÍ/LÍF hevur á fundi gjørt av, at felagið skal hava nýtt navn. Hetta skal eftir ætlan gerast á eykaaðalfundi, sum verður hildin tann 4. februar. Nevndin í GÍ/LÍF heitir á fólk um at koma við uppskotum um nýtt navn áðrenn 1. februar. Fremsta liðið hjá leirvíkingum og gøtumonnum spælir í Formuladeildini næsta kappingarár.



## Hans gjørdi løgið sjálvmál

Ungi føroyski málmaðurin Hans Jørgensen spælir fyri Fremad Amager, og um vikuskiftið fekk hann kjansin í einum venjingardysti ímóti Roskilde. Hans gjørdi seg merktan við einum heldur løgnum sjálvmáli í einum dysti, har nógvur vindur órógvaði. Hans fekk ein bólt frá viðspælari, tamdi eitt sindur skeivt, og tá hann skuldi sparka burtur, kom hann at senda bóltin í egið mál. Fremad Amager tapti dystin 2-1.

# "The Royals" taptu móti Roo og Ron

**Manchester United eru enn á odda í Premier League, eftir tvey mál í øðrum hálvleiki frá Wayne Rooney og Cristiano Ronaldo. Málini góvu teimum sigurin móti Reading á Madejski leikvøllinum. Aðrastaðni fekk Keegan stig, meðan Arsenal og Chelsea vunnu**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tá Manchester United fer á vitjan hjá einum liði sum Reading, tá eigur man at vænta at tað nærum er ein avgreiðsluspurningur, men so var ikki um vikuskiftið. Í langa tíð av dystinum høvdu United heldur trupult við at spæla móti einum treiskum heimaliði, men móti endanum skrædnaði.

### Ronaldo, enn eina ferð

Liðið hjá Sir Alex Ferguson var í døpurhuga í stórum løtum av dystinum, men móti endanum fingu teir hol á í 77. minutti, tá Wayne Rooney varð spældur leysur av Carlos Tevez.

Cristiano Ronaldo økti um munin í tíðini, dómarin hevði valt at lagt afturat, tá hann eftir mótálop, lættliga kundi seta tánna á bóltin, og leggja United á odda 2-0 og samstundis pynta um sítt imponerandi máltev, ið mangan hevur bjargað United úr vónleysum støðum. Hann hevur nú skotið 17 mál í Premier League, og er tað tvey fleiri enn Emmanuel Adebayor hjá Arsenal.

### Keegan er komin heim

Heimkoman hjá Kevin Keegan til Newcastle fyri aðru ferð sum venjari, endaði í málleysum javnleiki, tá Bolton komu á vitjan.

Besta málmøguleikan í dystinum átti innskifti J'lloyd Samuel hjá Bolton, men hansara roynd varð bjargað av íranum, Shay Given í Newcastle málinum.

### Enn ájavnir United

Arsenal blivu veranda aftanfyri United uppá málmun, eftir at áleyparin Emmanuel Adebayor skoraði tvær ferðir høgdi til í 3-0 sigrinum móti Fulham á Craven Cottage.

Miðvallarin, Tomasz Rosicky krýndi ein sera góðan dyst frá sínari síðu, við einum máli, ið var fluktað í netið, tá nýggju minuttir írestaðu.

### Chelsea halda trýstið

Chelsea hildu trýstið á tey bæði ovastu liðini, eftir at teir vunnu ein tepran 1-0 sigur móti einum kempandi Birmingham liði á St. Andrews leikvøllinum.

Peruvianski áleyparin, Claudio Pizarro stútaði eitt hornaspark frá Juliano Belletti í netið tá 11 minuttir írestaðu, og tað var nóg mikið til at geva Avram Grant og hansara monnum, enn ein sigur.



*Manchester United hava 54 stig, og tað sama hevur Arsenal, meðan Chelsea eru byrjaðir at vísa styrki og eru komnir uppá 50 stig*

### 100 til Keane

Tá Tottenham høvdu vitjan av Sunderland um vikuskiftið var tað ikki Roy Keane, venjari hjá Sunderland, ið stjól yvirskriftirnar. Heldur var tað landsmaður hansara, tann nakað yngri Robbie Keane, ið við sínum máli nummar 100 fyri Spurs, kundi tryggja Londonfelagnum sigurin, eftir at Aaron Lennon hevði lagt teir á odda.

### FAKTA

**Úrslit um vikuskiftið**

| | |
|---|---|
| Birmingham-Chelsea | 0-1 (Claudio Pizarro) |
| Blackburn-Middlesbrough | 1-1 (Derbyshire-Wheater) |
| Fulham-Arsenal | 0-3 (Adebayor 2, Rosicky) |
| Man City-West Ham | 1-1 (Vassell-Cole) |
| Newcastle-Bolton | 0-0 (-) |
| Portsmouth-Derby | 3-1 (Benjani 3-Nyatanga) |
| Reading-Man Utd | 0-2 (Rooney, C.Ronaldo) |
| Tottenham-Sunderland | 2-0 (Lennon, Keane) |
| Wigan-Everton | 1-2 (Jagielka-Johnson, Lescott) |
| Liverpool-Aston Villa | (Skal spælast í kvøld, 21. januar klokkan 20) |

# Børn og vaksin skutu

**Um vikuskiftið skipaði Bogaskjótifelagið Ørvur fyri kappingum í Runavík. Leygardagin skutu børnini 12 metur og sunnudagin skutu tey vaksnu 18 metur**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Tað eru ov fá ung, sum skjóta við compound, men tað heldur ikki okkara besta unga skjútta í compound, Magnus Andreassen úr Ørvi (Ø), aftur. Hann gjørdi bart og setti nýtt føroyskt met við at skjóta (287+287) 574 stig. Gamla metið átti Sámal Petur Joensen og varð tað skotið í ár 2000.

Í bólkinum recurve vóru heldur fleiri luttakarar – 10 í tali. Sum heild kann sigast, at innleiðandi umfarið gekk sera væl. Allir skjúttarnir uttan ein skutu persónlig met.

Bestu innleiðandi úrslitini vóru: Bogi Andreasen, Vága-Skot (V), (264+260) 524 stig, nr. 2 Tummas Eidesgaard, Ø, (249+251) 500 stig, nr. 3 Odd Andreassen, Ø, (248+224) 472 stig og nr. 4 Rógvi Dalsgarð, Tambar (T), (229+225) 454 stig.

Av tí, at 10 luttóku, vóru bert tveir dystir í 1/8-finalunum. Dystirnir vóru millum Fróða Dam, T, og Rógvi Larsen, T, 87-51, og Sirið Rein, T, og Rani L. Beder, T, 96-73.

¼-finalurnar: Bogi A.-Fróði 104-92, Bogi Mørkøre, Ø,-Rógvi D 65-98, Odd-Oddmar Nielsen, Ø, 90-82 og Sirið-Tummas 86-105.

½-finalurnar: Bogi A.-Rógvi D. 99-105 og Odd-Tummas 97-98.

Dysturin um triðja plássið var millum Boga A. og Odd og vann Bogi trygt 107-89.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Rógva D. og Tummas. Hesin dystur var sera javnur heilt fram til seinasta umfar, tá Rógvi gjørdi eitthvørt, har hann ikki rakti skivuna, dysturin endaði 88-96 og vann Tummas sostatt sína næstu kapping.

### Vaksin

Heldur fá vaksin luttaka í vetur, men eru úrslitini góð.

Í compound bólkinum vóru innleiðandi úrslitini hesi: Per Holm Andersen, Ø, (284+283) 567 stig, nr. 2 Magnus Andreassen, Ø, (275+271) 546 stig og persónlig met og nr. 3 Kaj Johannesen, Ø, (271+263) 534 stig og persónligt met.

Per sat yvir í ½-finalunum ímeðan Magnus og Kaj skutu ein dyst, sum endaði 107-103.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Per og Magnus. Tann ungi Magnus gav Per stóra mótstøðu. Per legði seg á odda við tveimum stigum eftir fyrsta umfar, meðan Magnus tók eitt stig inn aftur í øðrum umfari. Næstu tvey umførini skutu teir javnt. Dysturin endaði við sigri til Per 111-110.

Í bólkinum recurve vóru 7 luttakarar. Innleiðandi úrslitini vóru hesi: Hans Petur Højgaard, Ø, (270+274) 544 stig, nr. 2 Jógvan Magnus "Eggaba" Andreasen, V, (269+268) 537 stig og persónligt met, nr. 3 Eirikur í Jákupsstovu, Ø, (266+259) 525 stig og nr. 4 Jastrid M. Jensen, T, (254+246) 500 stig. Tveir aðrir skjúttar høvdu persónlig met.

¼-finalurnar: Hans Petur sat yvir, Tórfinn Hansen, V,- Jastrid 101-97, Eirikur-Nikkel Petersen, Ø, 103-100 og Jim S. Guttesen, V,-Eggaba 83-95.

½-finalurnar: Hans Petur-Tórfinn 106-101 og Eirikur-Eggaba 104-92.

Dysturin um triðja plássið var millum Tórfinn og Eggaba. Teir høvdu ein spennandi javnan dyst, sum endaði við sigri til Eggaba 96-95.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Hans Petur og Eirik. Úrslitini í umførunum vóru 27-26, 27-29, 29-28 og 28-26 og vann Hans Petur enn ein spennandi dyst við 111-109.